## Lena og Høgni í Cafe Kino



Í summar var amerikumaðurin Bret Perkins í Føroyum fyri Dansk Artistforbund. Hann var á tveimum sýnisglugga konsertum í Kagganum, umframt at hann vitjaði G!Festivalin. Í kvøld sæst fyrsta úrslitið av vitjanini tá Høgni Lisberg og Lena Anderssen luttaka á Songwriters In The Round í Cafe Kino á Amager.

Lena, Høgni, Roar Amundsen, Jimmy Andersen og Josefina Sanner luttaka á tiltakinum, ið hevur Brett Perkins sum vert. Tey lova eitt akkustiskt kvøld, ið verður intimt, afturlítandi og stuttligt.

Bret Perkins segði í summar við planet.fo, at tað at skapa netverk í tónleikaídnaðinum er ómetaliga týdningarmikið.

Bret Perkins skipar seinni í ár fyri tónleikaverkstaði í Føroyum. Talan er um sonevnda samskriving, ið Bret Perkins metir vera ein tann besta møguleikan fyri at skapa netverk innan tónleikaheimin. Her verður talan um verkstað, har eini 8 føroyskir sangskrivarar skulu skriva løg saman við 8 donskum sangskrivarum, og eisini møguliga sangskrivarum úr øðrum londum. Skeiðið er fingið í lag í samstarvi við Norðurlandahúsið, Dansk Artistforbund og FUT.

Hetta gevur tónleikarunum møguleika fyri at skapa sær netverk, og at fáa íblástur frá hvør øðrum. Hetta hevur Bret Perkins gjørt við nógvum tónleikarum, og hann hevur somuleiðis ført nógvar sangskrivarar saman, t.d. er lagið Josephine hjá Teituri Lassen eitt úrslit av samskriving, ið Bret Perkins hevur lagt til rættis.

Konsertin í CafeKino á Øresundsvej 6 verður í kvøld klokkan 21. Hurðarnar lata upp klokkan 20. Les meira um hetta á www.cafekino.dk og www.brettperkinspresents.com.

Hjartafelagið:

## Heilsukanning í Kelduni



**Hjartafelagið skipar fyri almennum fyrilestrum og heilskanning í Kelduni í Skálafirði 15. og 16. september 2006.**

HJARTALFELAGIÐ

Stóra árliga kunningar- og kanningarátakið hjá Hjartafelagnum verður í ár í Kelduni í Skálafirði tann 15. og 16. september.

Hjartafelagið hevur seinastu 18 árini á nærum hvørjum ári skipað fyri stórum átakið við fyrilestrum og kanning av fólki ymsastaðni í Føroyum. Tiltøkini hava fingið sera góða undirtøku allastaðni, har felagið hevur verið. Soleiðis hevur felagið gjøgnum hesi árini kannað fleiri enn 7.000 fólk.

Tá tiltakið var í Havn í 2005, møttu 936 fólk til kanningar (2003 í Klaksvík: 435 fólk). Seinast felagið var í Eysturoy var í 1999 á Glyvrum, tá blivu 678 fólk kannaði.

Ætlanin er so í ár at hava tiltakið í nýggju hølunum hjá samkomuni Kelduni í Skálafirði. Tiltakið fevnir um 2 dagar:

Fríggjadagin 15. sept. kl. 19.00 verða tríggir fyrilestrar:

Svanna Hanusardóttir, ítrottarlærari, greiðir frá um íðkan og um týdningin, kropsrørðsla hevur fyri heilsuna. Elisabeth Akursmørk, økonoma, um heilsugóðan kost.

Heðin Thomsen, yvirlækni, um hjartasjúku og viðgerð/fyribyrging av hjartasjúku. Høvið verður at spyrja fyrilestrarhaldararnar.

Leygardagin 16. sept. frá kl. 9.00 til kl. 17.00 er opið hús. Øll er vælkomin leygardagin at lata seg kanna. Høvi verður at fáa blóðtrýst, hædd-vekt (BMI), kolesterolog blóðsukurmátað. Eitt lítið spurnarblað verður at útfylla. Ymiskt kunningartilfar verður til taks, og fólk frá hjartafelganum svara spurningum.

Fyrilestrar, kunningartilfar, blóðtrýstmáting og BMI-máting er ókeypis. Blóðroyndin (kolesterol/blóðsukur) kostar 50 kr.

Hjartafelagið metir, at tað er sera týdningarmikið fyri fólkaheilsuna, at øll vita, hvat teirra blóðtrýst er, so at tey kunnu koma í viðgerð, um trýstið vísir seg at vera ov høgt. Eisini eiga øll at vita, hvat teirra kolesterolvirði og blóðsukur er og setast í viðgerð, um hesi eru ov høg. Felagið vónar tí, at nógv fara at møta til tiltakið 15. og 16. sept.

Meira fæst at vita um hjartafelagið á heimasíðuni: www.hjartafelag.fo

# Fáa løn fyri at ganga

**839.652 almennar krónur eru higartil farnar til lønir og húsaleigu til Serdagstovnin á Argjum, hóast stovnurin als ikki er farin at virka enn. Í vikuni fóru handverkarar undir at seta húsini í stand, enn eru ongi børn ávíst til stovnin, og leiðarin, sum varð settur 1. februar, er farin í annað starv**



*Hesi húsini á Argjum, verða framyvir karmur um Serdagsstovnin fyri børn við álvarligum atferða- og tilknýtingartrupulleikum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

SAMFELAG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

- Talan er um eina samanrenning av óhepnum hendingum, sum seinkaði stovninum, sigur Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni, sum hevði ætlað, at stovnurin skuldi latið upp 1. mai.

Stovnurin til børn undir skúlaaldri við álvarligum atferða- og tilknýtingartrupulleikum hevur nú verið áleiðis í meiri enn tvey ár. 1. februar í ár var Hans Mourits Foldbo, sálarfrøðingur, settur í fast starv sum leiðari fyri stovnin, og var tað hansara uppgáva at finna hóskandi hús og at seta starvsfólk til stovnin.

1. mai vóru fimm starvsfólk sett í starv og nú, fimm mánaðir seinni, er húsið, har stovnurin skal húsast, framvegis eitt byggipláss, og starvsfólk eru ørkymlað, tí tey sleppa ikki til verka. Men hvønn mánað hava øll fingið løn, og húsaleigan hevur verið goldin. Nú er leiðarin farin í annað starv, og eitt av starvsfólkunum hevur sagt seg úr starvi.

### Er ovfarin av tilgongdini

Eitt av starvsfólkunum sigur, at hon er ikki sørt skakað av, at so drúgv tíð gongur, frá tí, at tey eru sett í starv, til tey sleppa í gongd.

- Eg havi starvast í øðrum samanhangum, eisini í øðrum londum, og eg øtist yvir, at tað gongur so long tíð, sigur starvsfólkið, sum ikki ynskir at vera nevnd, av ótta fyri at koma í ringt ljós hjá myndugleikunum.

- Hondverkararnir fóru til verka í gjár og har er nógv, sum skal gerast í húsinum. Eitt nú skulu allar veggja- og loftsplátur skiftast út við brunatrygt tilfar, og kjallarin skal brunatryggjast, sigur viðkomandi, sum eisini greiðir frá, at tey fóru ágrýtin til verka fyrstu tíðina.

- Fyrstu vikurnar hittust vit javnan. Orðaðu endamál fyri stovnin og gjørdu virksemisætlan. Eisini vóru vit á skeiði og á kunningarferð í Danmark og síðani hava vit verið heima og lisið og lisið, men eg má viðganga, at nú er luftin farin úr ballónini, at tað er ikki stuttligt longur at ganga heima og loysa krossorðagátur, sigur hon. Og hon vísir á, at hon nú er biðin um at taka nakrar vaktir á einum øðrum stovni í býnum síðst í september, men annars einki hevur gjørt síðani einaferð í juli mánaði.

- Eg kenni meg í roynd og veru rættiliga ørkymlaða, tí ætlanin var, at vit skuldu hava móttøku fyrst í juni, og vit høvdu stungið út í kortið ætlanir fyri komandi vikurnar. Men so dró málið um húsini út, og vit kenna okkum vónsvikin yvir, ikki at sleppa til verka, sigur starvsfólkið, sum eisini vil vera við, at mannagongdin at seta stovnin á stovn hevur verið umvend av tí, sum hon kundi hugsað sær

- Fyrst seta tey leiðara, síðani starvsfólk, hareftir koma húsini og at enda verða børnini funnin. Haldi, at tað átti at verið umvent, hóast tað sjálvsagt er neyðugt, at leiðarin verður settur rættiliga tíðliga í tilgongdini.

### Óheppin samanfall

Petra Johnsdóttir Joensen, sum er stjóri á Almannastovuni, hevur ábyrgdina fyri stovninum. Vit spyrja hana, um hon ikki kundi hugsað sær, at tilgongdin var øðrvísi skipað, so húsini til stovnin vóru klár, áðrenn søkt varð eftir starvsfólki?

- Talan er um óheppin